Býráðsformaðurin á Tvøroyri bleiv illa við

– Tann dagin, vit hava brúk fyri at taka samferðsluhavnina á Drelnesi til oljuhavn, gera vit tað. Men vit fara ikki at lata landskassanum endurgjald afturfyri, sigur Dan Nielsen, býráðsformaður á Tvøroyri

–Tað er onki at raffla um: Tvøroyrar Kommuna hevur fullan ognarrætt og nýtslurætt yvir havnini á Drelnesi. Og landsstýrið hevur longu góðtikið, at hon verður tikin til okjuhavn. So endurgjald til landskassan kemur ikki upp á tal, sigur Dan Nielsen, býráðsformaður á Tvøroyri

ÁKI BERTHOLDSEN

–Eg má viðganga, at eg bleiv eitt sindur illa við.

Dan Nielsen, býráðsformaður á Tvøroyri sigur, at tað kom eitt sindur óvart á seg, at Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, nú nevnir møguleikan at reisa endurgjaldskrav ímóti Tvøroyrar Býráð.

Tvøroyar Kommuna hevur í fleiri ár arbeitt við at gera eina oljuhavn á Tvøroyri.

Býráðið hevur ongantíð dult, at ætlanin er at taka samferðsluhavnina á Drelnesi til endamálið.

Men tað fer so at bera í sær, at tað verður neyðugt at finna eina aðra samferðsluhavn til Smyril.

Men í Sosialinum fyrr í vikuni sigur Karsten Hansen, at tað er ikki vist, at landsstýrið uttan víðari fer at góðtaka, at Drelnes verður tikin til oljuhavn.

Landskassin hevur goldið ein part av havnini á Drelnesi og verður hon nú tikin til onnur endamál enn samferðsluhavn, kann tað koma upp á tal at krevja endurgjald frá Tvøroyrar Kommunu, sigur landsstýrismaðurin.

Hann legði afturat, at undir øllum umstøðum kann tað ikki koma upp á tal at Drelnes verður tikin til oljuhavn, fyrrenn ein onnur samferðsluhavn er tøk til Smyril, tí tað hevði verið til óbótaligan skaða fyri Suðuroynna, um ongin samferðsluhavn er.

Onki endurgjaldskrav

Hetta kom eitt sindur dátt við hjá býráðsformanninum á Tvøroyri.

Dan Nielsen leggur stóran dent á, at landsstýrið hevur hvørki fær, ella hevur rætt til endurgjald frá Tvøroyrar kommunu, um so er, at Drelnes verður tikin til oljuhavn.

Hann vísir á, at havnin á Drelnesi er ogn hjá Tvøroyrar Kommunu og at kommunan tískil eisini fer at brúka havnina til tað endamál, sum hon heldur, tænir henni best.

–Tí kann eg púra avgjørt siga, endurgjald til landskassan kemur ikki uppá tal, hóast vit taka Drelnes til oljuhavn.

Býráðsformaðurin á Tvøroyri sigur, at tað er ein landsuppgáva at hava samferðsluhavnir kring landið.

– So tann dagin, vit hava brúk fyri Drelnesi til oljuhavn, verður hon tikin, um tað so verður í morgin, ella tað verður um trý ár.

– So verður tað uppgávan hjá landsstýrinum at finna eina aðra samferðsluhavn í Suðuroynni til Smyril.

Dan Nielsen sigur, at Tvøroyrar Kommuna avgjørt metir oljuvinnuna sum ein møguleika at venda teirri keðiligu gongdini í Suðuroynni við fráflyting, arbeiðsloysi og hægsta skattatrýsti, sum tað ber til at hava.

– Tí tað er heilt avgjørt, at kemur tað so langt, verður havnin á Drelnesi eisini tikin til oljuhavn. Vit hava harðliga brúk fyri øðrum vinnum í Suðuroynni, leggur hann afturat, so tann møguleikan fara vit undir ongum umstøðum at lata okkum gleppa av hondum.

Er góðtikið

Dan Nielsen heldur eisini, at Karsten Hansen er heldur seinur á sjóvarfallinum.

–Landsstýrið hevur longu góðtikið, at Drelnes verður tikið til oljuhavn.

–Tað hendi á einum fundi ímillum Tvøroyrar Býráð og landsstýrið, seinasta summar, har m.a. landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Finnbogi Arge, og landsstýrismaðurin í oljumálum, Eyðum Elttør, vóru við. Somuleiðis vóru bæði løgmaður og aðalstjórin í vinnumálastýrinum, Arni Poulsen við á fundi.

– Eftir tann fundin skrivaði landsstýrið eina fundarfrásøgn, har tað verður staðfest, at landsverkfrøðingurin skal arbeiða víðari við uppskotinum um eina fyribils samferðsluhavn á Tvøroyri.

– Samstundis skal hann arbeiða víðari við spurninginum um eina endaliga samferðsluhavn í Trongisvági.

Dan Nielsen sigur, at fundurin snúði seg um ætlanina hjá Tvøroyrar Kommunu um at taka Drelnes til oljuhavn.

–Sostatt kann fundarfrásøgnin hjá landsstýrinum ikki misskiljast. Hon kann bara skiljast sum um, at landsstýrið góðtekur, at Drelnes verður tikið til oljuhavn, sigur býráðsformaðurin á Tvøroyri.

Nýggi rækjutrolarin hjá Vágbingum fiskar væl

South Island hevur avreitt fimm ferðir. Tilsamans hevur hann avreitt 1100 tons

Tað hevur gingist væl hjá vágbingum, síðan teir fingu nýggja skipið í februar

ÁKI BERTHOLDSEN

Higartil hevur tað gingið væl hjá nýggja rækjutrolarunum hjá vágbingum.

South Island fór til fiskiskap 1. mars og nú fara teir skjótt at avreiða at sætta túrinum.

Seinast teir avreiddu var 7. juli, tá ið teir løgdu fimtu lastina upp á land.

Hesar fimm túrarnar hava teir avreitt tilsamans 1100 tons. Sostatt hevur South Island í miðal fingið 275 tons um mánaðin.

Og hendan sætta túrin hevur fiskiskapurin verið tann sami, so nú fara teir skjótt innaftur.

Hesin South Island er tann báturin, sum vágbingar í ár keyptu úr Íslandi fyri tann gamla South Island, sum í fjør varð seldur til USA.

Talan var um navnframa íslendska trolaran „Bessi“ sum tá kom undir føroyskt flagg.

Bessi kostaði um 60 milliónir.

Nýggi trolarin er nógv størri enn tann gamli var og umstøðurnar og trivnaðurin hjá manningini eru nógv betri.

Men nýggi trolarin skuldi eisini fiskað væl meiri enn tann gamli fyri at tað skuldi mala runt. Hann skuldi fiskað fyri góðar 30 milliónir um árið fyri at bera seg.

Og nú báturin hevur verið burtur í næstan fimm mánaðir, kann staðfestast, at higartil hevur fiskiskapurin gingið sum ætlað.

Eli Frederiksen, reiðari, sigur, at fiskiskapurin higartil hevur gingið sum ætlað.

Allar fimm lastirnar, sum hann hevur avreitt, eru lagdar upp í Kirkenes og í Tróndheimi í Noregi.

Men tær báðar fyrstu lastirnar vórðu seldar í Noegi.

Tær tríggjar seinastu lastirnar eru hinvegin seldar til rækjuvirkið á Oyri og tær eru sø førdar heim úr Noregi við farmaskipi.

South Island hevur fiskað í Barentshavi. Har verður hann væntandi verandi til í september, táið hann helst kemur heim.

Ætlanin hevur alla tíðina verið at gera ábøtur á verksmiðjuna umborð og reiðarin heldur, at tað kundi verið eitt gott høvi at gjørt tað tá, tí hetta er slakasta tíðin har eysturi.

Havt South Island fer aftaná tað, veit Eli Frederiksen ikki enn.

Smyrilsvegur var fullur

Smyrilsvegur og Hoyvíksvegur vóru hvør fullari enn annar í gjár. Fullir av fullum og tómum bilum, ið streymaðu sum meyrur út og inn í Rúsuna í Havn at fylla sær bagagurúmið og baksetrið við vátum sterkum løgi. Men teir báðir útsendu av Sosialinum fingu eina turra móttøku mitt millum alt tað váttliga.

RÚNAR REISTRUP

– Nei pínadoy far vekk!

– Ikki taka av mær - tak av honum!

– Gakk avstað við tær!

Sjáldan man myndamaður okkara hava fingið so nógv fís eftir sær sum fyrrapartin í gjár, tá hann fekk ta ótakksomu uppgávu at taka myndir á deildini hjá Rúsdrekkasølu Landsins í Havn í sambandi við at fólk keypa drekkivørur inn til ólavsøkuna.

Hóast langt er liðið síðan útloysingartíðina, tá tær mest óskyldigu taskurnar í landinum vórðu drignar inn á posthúsið, fyltar við innihaldinum av sundurskrøddum flamingokassum, og síðan bornar eins óskyldiga útaftur, eru føroyingar enn meira enn eitt sindur kroystir, tá teir keypa brennivín.

– Tað er nokk ikki so gott at tit taka myndir inni í handlinum, tí vit hava fleiri ferðir fyrr fingið klagur frá fólki, ið eru blivin avmyndað har, sigur Dagmar Joensen, leiðari á Rúsdrekkasøluni, tá vit eru farnir inn á kontórið at biða pent um lov at taka myndir. Dagmar loyvir okkum tó eftir eitt knæfall ella tvey at taka myndir við teirri treyt, at myndin verður tikin soleiðis, at fólk ikki kunnu kennast aftur.

Tað lova vit.

Gulldepotið hjá Stalin

Men hvat, júst sum myndamaðurin hevur klatrað upp á nakrar kassar av øli og ger seg til reiðar at taka eina mynd útyvir herligheitina og tey fólk, ið millum hana ganga, verður hann steðgaður av einum starvsfólki.

– Hava tit spurt Dagmar um lov?

Er hetta gulldepotið hjá Stalin ella er tað almenni einahandilin fyri rúsdrekka vit standa í?

Í botn og grund er Rúsan ein vanligur handil. Her kunnu øll uttan full fólk og børn sleppa at keypa júst tað, teimum lystir.

Úrvalið og presentatiónin av vørunum eru bæði stílfull, og tú skalt gustoy leita leingi eftir einum eins góðum rúsdrekkahandli í restini av heiminum.

Munurin millum at ganga í góðum friði og velja sær vørur í Rúsuni og so at standa í Netto í Danmark og í skundi hyggja eftir teimum trimum sløgunum av Vodka, ið standa uppiyvir súru kassadamuni er eyðsýndur.

Vit eiga at fegnast um at hava so góðar umstøður at keypa øl, vín og brennivín.

Friðarlig fyrisiting

Men tað gjørdi meginparturin av ólavsøkuinnkeyparunum í gjár týðuliga ikki. Hesir høvdu helst ynskt sær eitt myrkalagt rúm, har hvør maður gekk við síni veiku lummalykt, ið bara akkurát kláraði at kasta ljós á fløskuetikettirnar.

Vit uppgeva tankan um at fáa ólavsøkumyndir av rúsukundunum og fara afturum og onnur trappurnar til fyrisitingarliga partin av Rúsdrekkasølu Landsins.

Her gongur friðarliga fyri seg.

– Her er lítið at gera hjá okkum nú. Vit hava gjørt alt fyrireikingararbeiðið, og nú er bara sjálv sølan eftir, sigur Dagmar Joensen, meðan starvsfólkini í søluni standa við sveittabroti og taka pengar.

Tolnir grannar

Júst hvussu nógvir pengar koma inn og fløskur fara út ein dag sum 27. juli er ein loynidómur. Ikki av kappingarávum væl at merkja, men av trygdarávum.

– Sølan í dag man vera tríggjar ella fýra ferðir so stór sum vanligar fríggjadagar, tá stórt trýst ofta er á søluni, sigur Dagmar.

Tað hevur deildin hjá Rúsuni í Havn garderað seg fyri við at hava eyka parkeringsvaktir, eyka duravørar, eyka sølufólk, pakkarafólk og goymslufólk til arbeiðis.

Longu fríggjadagin í farnu viku fóru tey í Rúsuni at merkja, at fólk keyptu inn til ólavsøkuna.

Síðan tá hevur meira fólk enn vanligt verið allar dagarnar, men tað var kortini ikki nokk til at forða fyri tí, sum mest líktist kaos á Smyrlisvegi í gjár.

– Soleiðis plagar tað at vera. Frá klokkan 10 til á middegi er altíð nógv fólk. Síðan slakar tað nakað, men um trý tíðina til vit steingja er so aftur fult av fólki, sigur Dagmar.

– Slíkar dagar sum í dag skulu vit vera glað fyri at vit hava lagaligar grannar, leggur hon afturat, og hyggur út. Á parkeringsplássinum hjá LM-handlinum beint yvirav er trafikkaos.

Myndir: Jens K. Vang

Høgtíðir bera tómar fløskur

Vit siga farvæl við leiðaran á Rúsdrekkasøluni, fara út í fólkameldurin og síðan longur út í goymsluna.

Her gongur eitt sindur friðarligari fyri seg, men tó so hektiskt, at lagurmenninir hava fingið sveittan fram.

Tómu fløskurnar streyma nevniliga eisini inn undan ólavsøkuni. Røðin av tómum fløskum, ið koma eftir samlibandinum frá fløskuautomatunum, verður mestsum ikki brotin í døgunum undan ólavsøku.

– Her koma altíð ein øgilig rúgva av fløskum inn undan høgtíðum. Tær koma frá fólki, ið bara keypa inn til høgtíðir. Hesar fløskurnar, sum koma inn nú, keyptu tey á páskum og jólum, og tær fløskurnar, ið tey keypa inni í søluni nú, fáa vit aftur undan jólunum, sigur Martin Enok Jespersen, goymsluleiðari.

Fyrstu dagarnar aftaná ólavsøkuna er ikki so nógv at gera hjá sølufólkunum, men tá standa teir á lagrinum aftur við sveittabroti.

– Teir fyrstu dagarnar kemur ein rúgva av smádreingjum við einari øgiligari rúgvu av fløskum, sum teir hava samlað um ólavsøkuna. Teir eru okkara nógv størstu kundar fyrstu vikuna eftir ólavsøku, sigur Martin.

Og soleiðis enda fløskurnar aftur á rætta stað.

ÓLAVSØKAN:
Opið:
Ólavsøkuaftan kl. 9-19
Ólavsøkudag kl. 14-19
Tilboð
Allar taskur 1/2 pris
29
Í Tróndargøtu
tel. 318200